Føroyski leypurin

Gerð og snið — Leypanövn

Eftir *Jóhannes av Skarði*

INNLEIÐING

Í Føroyum eins og í øðrum londum bera amboðini, fólkið hevur havt í dagliga arbeiði sínum, boð um fólksins mentan. Víst hava vit ikki mikið at vísa á av træskurði ella øðrum listhandverki, aftur ímóti øðrum fólkum, sum t.d. gronnum okkara íslendingum og norðmonnum. Men í amboðum til alt arbeið á landi og sjógvi og í bjørgum kunnu vit vísa á eina mentan, amboðsmentan, sum stendur mát við ta hjá gronnunum. Hesi amboð eru úrslit av longum royndum og eru gjørd við miklari snild, og tey eru tí so væl hóskandi, ofta út í ytstu æsir, tí, tey eru ætlað, at vit undrast. Og tó at tey ikki eru prýdd við reypandi kroti ella prunki, hóma vit vakurleikagleðina í einfaldum prýðingum, sum t. d. hesum fínu listum, teimum dámdi so væl at seta á lutirnar, t. d. árar, borð og stokkar á báti, ella vit kunnu nevna lúsaoyrað, sum skorið er upp ímóti ennisspóninum, bert fyri at nevna tvey dømi; — í lítillæti sínum fín list. Men mest hugtakandi er sum sagt, so væl hvørt amboð, ja hvør einstakur lutur av amboðunum hóskar til tað, hann er ætlaður.

Eitt dømi uppá hetta er leypurin við tí sniði, hann hevur fingið í Føroyum. Ætlaður til at bera á bakinum má

hann vera lættur og sterkur, hann er bæði. Og við fetlinum væl evnaðum og hóskandi til longdar, liggur byrðin væl á rygginum. Og so einfaldur, hann er smíðaður, er hann vakur.

Í nakrar øldir hava føringar gingið undir leypi og hava í honum flutt tað, sum flytast skuldi eftir landi, — ella teir hava reitt, teirið høvdu ross. Hvussu leingi, vita vit ikki við vissu, tí her, sum í so mongum førum, vanta okkum skrivligar keldur.

Í einstøkum gomlum søgnum kemur leypur fyri, t.d. í søgnini um Snopprikk, Giljabóndan og Laðangarðsbóndan. Bóndin vil sleppa sær frá Snopprikki og skjýtur bát frá landi við Snopprikki í og tveimum gentum, og ongar árar í bátinum. Og søgnin sigur, at tey róku til Hetlands. Onnur gentan, dóttir Pætur við Kvíggja í Sunnbø «kom heim aftur at vitja eina ferð. Pápin og baggjarnir vóru út at rógva . . . Tá ið hann (pápin) kom inn við fiskaleypinum . . . , kundi hon ikki ráða sær, men . . . rópaði: «Á pápi, eg skal taka av tær!»» (*Jakobsen* (1898–1901). Hetta man hava verið í fyrru helvt av 16. øld (*Jakobsen* 1898–1901), og er søgnin álítandi viðvíkjandi tí við fiskaleypinum, hava menn tá sum nú borið fiskin í leypi av støðni og til hús.

Lucas Debes nevnir einki um leypin. — Ta fyrstu rættiligu lýsing av leypinum gevur okkum *Svabo* (1781–82). Tað er mest rossleypin, hann lýsir (hann hevur góða mynd av rossleypi), og tað er í skapi sami rossleypurin, vit hava enn í dag. Men tá ið hann sigur: «De Løber, hvori man bær noget på Ryggen, «Biralejpur», ere mindre . . . ,» hóskar hetta ikki við tað, sum nú er. Nú er byrðarleypur yvirhøvur størri enn rossleypur, og her man Svabo hava mistikið seg. — Tað *Landt* (1800) hevur um leypin, er eftir Svabo, bert nevnir hann afturat, at á «Lewis Ejland under Skotland» reiddu teir torv. *Winther* (1875) nevnir nakað lítið um leypin, somuleiðis *Lunddal* (1851) og *Annandale* (1903).

Eitt sindur gjøllari lýsing hevur *Bruun* (1911); hann nevnir bæði rimaðan leyp, tætt-, ross- og grótleyp, og eisini leyp, sum tættur er á einari síðu, har sum fetilin er, men hinar síðurnar rimaðar. — Endiliga skrivar eisini *Williamson* (1947) um leypin. — Hetta umframt mangar aðrar høvundar, ið nevna leypin í ritum um Føroyar.

Evnið leypurin kann verða býtt sundur soleiðis: 1. Gerð og snið leypsins, 2. leypanøvn, 3. leypamál í sambandi við onnur mál, t. d. kannubæra og fimting[1]) o. o. og 4. leypurin sum amboð í arbeiðslívinum. — Í hesi grein verða viðgjørdir spurningarnir 1. og 2., og ætlanin er í aðrari grein í komandi Fróðskaparriti at viðgera 3. og 4.

Undirstøðan undir hesi grein eru upplýsingar, sum fingnar eru við svørum upp á spurnarbløð, send til 39 fólk í 35 bygdum kring landið umframt egnar upptekningar. Roynt var at velja hesar bygdir, at senda spurnarbløðini til, so, at tær sum best skuldu kunna geva okkum ein tvørskurð av myndini um leypin. Spurnarbløðini vórðu send til:

8 bygdir í Norðuroya sýslu
4 bygdir í Eysturoyar sýslu
9 bygdir í Streymoyar sýslu
3 bygdir í Vága sýslu
6 bygdir í Sandoyar sýslu
5 bygdir í Suðuroyar sýslunum báðum.

Myndirnar 1 og 2 eru frá Bambus-ljósmyndastovu. Hinar hava Kristoffer Kristoffersen (mynd 3, 5, 6, 7 og 8) og Curt von Jessen (mynd 4) teknað. Allar mátingar eru gjørdar av høvundinum sjálvum.

Nýttar styttingar: A. = Argir; Da. = Dalur; E. = Eldu-vík; Ei. = Eiði; F. = Funningur; Ff. = Funningsfjørður; Fms. = Fornminnissavnið, Tórshavn; G. = Gásadalur;

[1]) Fimtingur er mál, sum bert verður nýtt í Suðuroy, og sum viðgjørt verður í aðrari grein í Fróðskaparriti 5.

Gj. = Gjógv; He. = Hestur; Ho. = Hov; Hó. = Hósvík; Hoy. = Hoyvík; Hú. = Húsavík; Hv. = Hvalbøur; Ki. = Kirkja; Kl. = Klakksvík; Koll. – Kollafjørður; Ku. = Kunoy; Kv. = Kvívík; LF. = *Grundtvig, Svend* og *Bloch, Jørgen:* Lexicon Færoense, København 1877–88, handrit á Det kongelige Bibliotek, Keypmannahavn. Mv. = Miðvágur; N. = Nólsoy; Nd. = Norðradalur; No. = Norðuroyar; Sa. = Saksun; Sd. = Sandur; Ská. = Skáli; Sko. = Skopun; Skv. = Skálavík; Su. = Suðuroy; Svk. = Sandvík; T. = Tórshavn; Tr. = Trøllanes; Ve. = Vestmanna; Við. = Viðareiði.

GERÐ OG SNIÐ

Tað er ikki ógløgg lýsing av leypinum, tá ið hann í bókmentum verður nevndur rimaður kassi. Men í huga føroyingsins hevur leypurin – við tí miðstøðu hann hevur sum arbeiðsamboð og tí handaverki, ið liggur í at smíða hann – eina støðu, sum ikki er at hópalíkna við kassan, sum hvørki leiðir hugan á fornvenju ella handaverk. Meðan kassin er eitt samanklampað ílæti, er leypurin amboð og handaverk á høgum stigi.

Nøvn á ymissu lutum leypsins.

(Skipað í bókstavarað; tølini framman fyri orðini vísa til mynd 3a).

1. árætti m. (a; ar).
   band n. (s; bond) á rossaleypi at halda botninum uppi (mynd 4b).
   bar n. (s; bar) = hol (Svk.).
   botnfjøl f. (fjalar; fjalir). Botnurin er gjørdur av botnfjølunum.
   botnrim[1] = niðasta rim.
   botnrim[2] = botnfjøl (Hoy.).
   botnshakarim = botnrim á teim síðunum, har botnshakarnir eru. (Ki.).
2. botnshaki m. (a; ar).

TALVA 1

1	2	3	4	5	Botnshakatj.		8	Breidd leypsins innan		11	12[2])	13[3])
					6	7		9[4])	10[4])			
Bygd	Innrúm	Stuðlatjúkt	Rimatjúkt	Rimaglopp (Miðaltøl)	Breidd	Hædd	Hædd leypsins innan	í erva	í neðra	Stuðulin oman fyri ovast. rim	Stuðulin niðan fyri undirsíðu botnsins	Stuðlalongd
	dm³	cm.	cm.	cm.	cm.	cm.	cm.	cm.	cm.	cm.	cm.	cm.
a. Svk.	94,3	3,2	0,8	2,7	2,5	2,0	51,5	42,8	42,8	3,9	5,0	61,2
á. Svk.	91,3	3,2			1,6	2,8	59,4	39,2	39,2	4,5	4,5	69,2
b. Hoy.	85,8	3,7	0,7	2,8	2,7	3,2	51,0	42,0	40,0	4,5	4,4	60,7
d. Svk.	78,2	3,0			2,7	2,7	46,5	41,0	41,0	4,5	1,3	53,1
ð. A.	76,6	2,9	0,8	2,2	2,5	1,8	58,1	38,9	33,6	5,0	6,5	70,4
e. Svk.	65,7	2,5			1,4	2,7	48,0	37,0	37,0	4,0	5,5	58,0
f. T.	64,3	2,8	0,7	3,4	2,0	2,7	51,0	35,5	35,5	4,5	3,7	59,9
g. Svk.	60,2	2,7	0,6		2,2	2,0	44,0	37,0	37,0	4,0	4,0	52,6
h. Da.	57,5	3,5	1,0	2,8	1,8	2,7	55,0	33,5	31,6	5,0	6,5	67,2
i. Svk.	47,1	2,5					42,2	33,3	33,5	4,5	5,0	52,4
j. Svk.	32,0	2,6			1,5	2,7	37,5	29,2	29,2	4,5	5,0	47,5
k. Tr.[1])	18,5	2,2	0,5		1,5	1,7	30,5	24,6	24,6	3,3	3,9	38,2
l. T.[1])	14,7	1,5	0,4	1,5	1,0	1,6	30,0	22,1	22,1	2,5	3,5	36,4
m.T.[1])	4,1	1,4	0,4	1,1	0,8	0,6	20,0	14,4	14,4	2,7	3,1	26,2

Í deild 2 er innrúm leypanna sett eftir stødd. Í deildunum 3—13 verða mátini á teimum ymissu lutum leypanna borin saman sínámillum og við innrúmið.

[1]) Hesir leypar hava ikki verið nýttir til vanligt arbeið, men eru gjørdir at vera «pappírskurvar».

[2]) Tað er at viðmerkja, at hetta eru gamlir leypar, undantikin *ð*, sum er nýggjur. Niðari endi stuðlanna er tí meira og minni slitin eftir aldri leypsins, nýtslu og tilfari; sí til dømis *d*, har eru teir nærum uppslitnir. Men hetta geldur ikki leyparnar *k*, *l* og *m*, tí teir hava bert staðið inni (sí viðm. [1])).

[3]) Tølini í hesi deild eru fingin á tann hátt, at tølini í deildunum 8, 11 og 12 eru løgd saman, og aftur at samløguni er so løgd tjúktin á botnfjølunum, t.e. nakað tað sama sum rimatjúktin.

[4]) Er leypurin breiðari til síðurnar enn aftur og fram, eru hetta miðaltøl.

botnsstuðul = botnshaki (No.).
fetil m. (s; fetlar), sí mynd 8 b og d.
fetlaband, sí mynd 8 b og d.
3. hol n. (s; hol) í stuðulin fyri oyra á rim og tappi á botnshaka.
kjaftrim = ovasta rim.
knabbi m. (a; ar) = knarvi.
knappur m. (s; ar) = knarvi.
knarvi m. (a; ar) á rossleypi; træpetti í endanum á bandinum at seta tvørturum í millumrúmið millum niðastu rimarnar, til at halda botninum uppi, staðin fyri at binda sum á mynd 4b.
knarvsband [knasband] = band við knarva.
leypsstuðul = stuðul.
4. nagli m. (a; ar).
nit[1] n. (s; nit) = botnshaki.
nit[2] = oyra ella tappur (Su.).
5. oyra n. (a; u) á rim.
6. plógv n. (pl. plógv) inn í stuðulin fyri rim.
7. rim f. (ar; ar).
seil f. (ar; ir) el. seila f. (u; ur) = fetlaband (Gj., F., Ff.).
stuðlur m. (s; ar) = stuðul.
8. stuðul m. (s; stuðlar).
9. tappur m. (s; ar) á botnshaka.
teggja f. (u; ur) = fetlaband (Su.).
teggj f. (ar; ar) = teggja.

Mátini á ymissu lutum leypsins.

Mátini á teim ymissu lutum leypsins eru ikki føst. Yvirhøvur eru einstøku lutirnir á stórum leypum sjálvandi størri enn á smáum; men ofta er tað, at t. d. stuðul ella rim á einum leypi eru tjúkkari enn á einum øðrum, sum størri er. Talva 1 vísir, hvussu ójøvn hesi mát kunnu vera. Avgerandi fyri tey eru ymiss viðurskifti, sum t. d. hvat leypurin skal verða nýttur til, hvat tilfar, ið til taks er

(ofta avgerandi) og særvild mannsins, ið eigur ella smíðar. Hetta seinasta avger eisini snið leypsins, t. d. um hann skal vera nógv svikin ella lítið, ella als ikki. Vanligt er, at ein bygdin í vissum førum hevur sítt serliga snið á leypi, ein onnur annað snið. Men kortini er alt sami leypurin við sínum eyðkennum.

Her verða mátini á høvuðslutum leypsins viðgjørd fyri hvønn lutin sær og víst til talvu 1, ið ber tey saman á ymist stórum leypum.

Stuðlarnir eru fýra, og teir bera navn sítt av røttum, tí teir eru álitið í leypinum, og í teir eru allir aðrir lutir hansara festir.

Á miðal byrðarleypi er tjúkt stuðlanna vanliga stívar 3 cm (t.e. tú fært stuðulin úr $^5/_4$" ráum handilsborði). Smærri leypar hava teir yvirhøvur klænri, men sum nevnt frammanundan er tó ofta, at ein leypur hevur tjúkkari stuðlar enn annar, ið størri er (talva 1). Longd stuðulsins sæst í talvu 1, 13. deild.

Rimarnar gera síðurnar á leypinum. Tær eru 4 (mynd 1c) ella 5 (mynd 1 a og b) í tali á hvørji síðu, eisini tá ið tað eru heilt smáir leypar. Tó hava summir menn 3 rimar í smæstu leypum; og undantøk kunnu vera, at heilt stórir leypar, t.d. hoyleypar, hava seks rimar (Ku.). So er leypur við rimum á trimum síðum, men framsíðan er tøtt (mynd 2, a). Eisini nevnir *Bruun* (1911) hendan leypin.

Um tjúkt rimanna er at siga nakað tað sama sum viðvíkjandi stuðlunum, at hon er ójøvn (talva 1).

Rimabreiddin er ymiss. Er tað vanligur byrðarleypur við 4 rimum, er vanliga breiddin 9—11 cm, og tær eru so at siga javnbreiðar (mynd 3 b). Er tað lítil leypur, verða sjálvandi rimarnar smalri. Men í 5-rimaðum leypi eru vanliga ovasta rim og botnrimin breiðari enn tær tríggjar miðrimarnar (mynd 3 a), sum ofta eru javnbreiðar; men við hvørt er mittasta rim ein vert breiðari enn hinar báðar. Annars er lutfallið ímillum breiddina á rimunum ógvuliga ymist; viðhvørt eru tær t. d. javnbreiðar allar sum á 4-rimaðum

a b c

Mynd 1. *a.* Byrðarleypur, Jacob Sivar Olsen, Argjum, gjørdi, (Fms. 3673 b.). *b.* Byrðarleypur úr Tórshavn. (Fms. 3673 a). *c.* Seksfimtingsleypur úr Sandvík. (Fms. 3646).

leypi. Men miðrimarnar eru ongantíð breiðari enn ovasta rim og botnurin.

TALVA 2.

Samanburður ímillum rimabreidd á vanligum 5-rimaðum leypi:

Innrúm	Ovasta rim	Mittasta rim	Botnrim
dm 3	cm	cm	cm
85,9	10,0	7,0	9,5
73,0	10,0	7,0	9,5
65,3	9,5	5,8	9,5
57,5	9,0	9,0	9,0
14,7	6,8	3,5	6,8
4,2	3,7	2,6	3,7

Rimagloppið er sera ymist. Eru rimarnar upp á seg breiðar, verður minni pláss til glopp, sum tá verða upp á seg smøl. Sjálvandi avger eisini stødd leypsins gloppini, soleiðis at smáir leypar hava yvirhøvur tættari ímillum rima enn stórir. Annars verður eisini hetta avgjørt eftir ymissum viðurskiftum, sum nevnt omanfyri viðvíkjandi øðrum lutum leypsins. Her kann nýtsla leypsins hava nakað at týða; til dømis kann torvleypur hava vítt ímillum rima, men á t. d. dyrgingarleypi (sí dyrgingarl. bl. 53) má gloppi ikki vera breiðari enn so, at leypurin heldur summarseiði.

Botnshakarnir eru tveir, ein á hvørjari lið leypsins, og har sum fetilin ikki er, t. e. ikki aftan og framman; hetta er tí, at annars hevði botnshakin notið ov fast á lendarnar á honum ið ber. Botnshakarnir skula halda tyngdini á tí, í leypinum er, tí á teimum liggja botnfjalirnar, ella tær við oyra ganga ígjøgnum teir. Men eins og við øðrum lutum leypsins, ella í enn meiri mun, er ikki vist mát á tjúkt teirra (talva 1). — Ikki verður lagt í, um innara og niðara síða botnshakans fyri ein part eru sneiddar, tá ið tilfarið er so, t. d. av vatnkanti. Men uttan og omaná eru teir slættir í fullari breidd.

a b

Mynd 2. a. Fjórðingsleypur við framsíðuni tættari, úr Sandvík, (Fms. 3647). *b.* Tættleypur úr Tórsh. (Fms. 3686).

Botnfjalirnar eru til tjúktar nakað sum rimarnar, viðhvørt tó ein vert tjúkkari.

Tilevningin.

So verða teir einstøku lutir evnaðir til. Merkt verður fyri holum (mynd 3 a3) og plógvi (mynd 3 a6) í stuðlarnar. Tey verða sett annaðhvørt mitt á stuðulin (mynd 3a), ella eitt sindur ytri (mynd 4a og b). Hetta er rættiliga vandasamt arbeið, serliga táið rimarnar á ymsu síðunum umskarðast og leypurin er svikin (mynd 4a); einfaldari er tað, táið rimarnar standa áraka hvørjar øðrum, og táið leypurin er tað sama breiður í erva og í neðra (mynd 3). Tað hevur verið umhildið at duga at smíða leyp; tí verður tikið til, at tann, ið dugir at smíða beinan leyp, hann dugir eisini at smíða hús. – Hol og plógv verða høgd í. Leypasmiður í Húsavík, Gustav Viderø, sigur, at ansast má eftir, at ikki verður høgt ígjøgnum ímillum holini fyri samankomandi rimum, ella ímillum plógv og hol. Har skal vera heilt ímillum (mynd 4b). – Fyrimunurin at lata rimarnar umskarðast (mynd 4a og b) er tann, at tú tá kanst hava breiðari oyru á rimunum, og leypurin verður sterkari. Eru rimarnar áraka hvørjar øðrum, fært tú ikki breiðari enn hálva rimabreiddina, ella, táið heilt skal vera ímillum holini, knappliga tað.

Rimarnar verða evnaðar og oyru skorin á endarnar; eisini hetta er sjálvandi einfaldari, tá ið leypurin er tað sama breiður í erva og í neðra, tí tá kanst tú brúka vinkul.

Á 4-rimaðum leypum ganga vanliga allar fýra rimarnar við oyra ígjøgnum stuðulin (mynd 3b), men á 5-rimaðum vanliga bert ovasta rim, mittasta rim og botnrim; hinar báðar miðrimarnar standa tá í plógv í fullari breidd (mynd 3a). Viðhvørt, helst í smáum leypum, ganga bert ovasta rim og botnrim ígjøgnum.

Tappur verður gjørdur á endan á botnshakunum, annaðhvørt skorin mitt á endan (mynd 3a og b) ella á ytru síðu sum eitt blað (mynd 5b), og hol høgd í stuðlarnar fyri

a b

Mynd 3. *a.* Byrðarleypur úr Tórsh.; sami sum á mynd 1 b.
b. Seksfimtingsleypur úr Sandvík; sami sum á mynd 1 c.

tappunum. Tú sært eisini leypar, har botnshakarnir ikki eru tappaðir í stuðlarnar, men negldir inn á teir innanvert (mynd 5a), men tað verður hildið óvandaverk.

Er ætlanin at lata botnfjalirnar ganga ígjøgnum botns-hakarnar, verða hol og plógv høgd í teir, og fjalirnar evn-aðar til á sama hátt sum við stuðlum og rimum (mynd 3a).

Samansetingin.

Nú verður sett saman rimar og botnshakar í stuðlarnar, og møguliga botnfjalir í botnshakarnar (mynd 3a). Síðan verður árættað, tveir árættar inn í endan á hvørjum oyra, og naglar settir í oyruni ein í hvørt. Missjavnt er, hvussu nógvir naglar eru. Á 4-rimaðum leypi sært tú leypar við nagla ígjøgnum øll oyruni, men eisini við nagla bert í ov-astu og tveimum niðastu rimunum (mynd 3b), ella bert í ovastu og niðastu (mynd 5a). Á 5-rimaðum leypi er van-ligt við nagla í øllum oyrunum (mynd 4a), t.e. á ovastu rim, botnrim og mittastu rim, men eisini bert í ovastu rim og botnrim.

Men vanligari enn at botnfjalirnar ganga ígjøgnum botns-hakarnar er tað, at tær liggja oman á botnshakunum, ross-leypurin undantikin, tí har ganga tær altíð ígjøgnum botns-hakarnar við oyra (mynd 4 b). Endin á teimum gongur tá annaðhvørt 1) undir botnshakarimarnar og røkkur út áraka útsíðuna á rimini (mynd 4a), ella á stuðlinum (mynd 3b og 5a), ella 2) tær hava endan ímóti botnshakarimini innan. Hesin botnurin, sum liggur omaná, er oftast tættur (mótsett har fjalirnar ganga ígjøgnum botnshakarnar, tá er hann ofta ótættur (mynd 3a)), og fjalirnar tríggjar.

Skorið verður burtur úr síðufjølunum fyri stuðlunum, so at ytra síða á fjølini sleppur ímillum stuðlarnar og út ímóti botnrimini, ið annaðhvørt gongur niður við henni til undir-síðu hennara (mynd 4a), ella bert niður áraka ovaru síðu hennara.

Botnfjalirnar verða stundum heftar í botnshakarnar við trænøglum; eisini verður, har botnfjalirnar ganga undir

b

a

Mynd 4. *a*. Byrðarleypur úr Húsavík. *b*. Rossleypur úr Húsavík.

botnshakarimarnar, trænagli settur í hvønn endan á mittastu fjøl beint innanvert botnshakan, at hon skal ikki glíða út. Síðufjalirnar sleppa ongan veg, tí skoran um stuðlarnar heldur, og uppeftir sleppa tær ikki, tí botnshakarimarnar standa niður á tær.

Henda lýsing av gerð og sniði leypsins gongur út frá tí rimaða leypinum. Hann má eisini roknast at vera høvuðsleypurin, tann leypurin sum brúktur hevur verið til at bera í alt handaslag. So eru aðrir leypar, men gerð teirra flestu er í høvuðsdráttum tann sama, bert við ymissum frávíkingum.

Rossleypurin (mynd 4 b) er vanliga rimaður, oftast eru rimarnar smalri enn á rimaðum leypum og umskarðast. Viðhvørt vantar næstovasta rim á tí síðuni, har fetilin er; tað er fyri at leypurin skal liggja betur inn ímóti síðuni á rossinum. Eyðkent við rossleypinum er, at botnurin er leysur á einari síðu, fremri botnshakin gongur leysur ímillum stuðlarnar, og hin botnshakin melur við rundum tøppum í holum í stuðlunum. Hann verður hildin uppi við bandi, men kann takast frá við at loysa bandið. Vanliga er hann sterkliga gjørdur, botnfjalirnar altíð við oyra ígjøgnum botnshakarnar, og ofta er tjúkkari tilfar í honum. Teir árættaðu ikki rossleypin so fast, tí hann skuldi kunna geva seg. (Hú.). Tá ið klyvjaross skotraðust við tómum leypum, kundu teir vera næstan flatir, so nógv góvu teir seg (Skv.), so tað er ikki av ongum, at tikið hevur verið til: «Skinklar sum gamal rossleypur».

Mynd 2 a og 5 a vísa leyp, sum hevur rimar á trimum síðum, men ein síðan er tøtt. Vanligur er hann bert í summum bygdum í Suðuroy, t. d. Hvalba og Sandvík, men er kendur í summum bygdum norðanfyri.

Hoyleypur er ofta hin vanligi byrðarleypurin, men summar staðir hava teir serliga gjørdar og ofta stórar hoyleypar t. d.: 6 rimar á framsíðuni, á hinum 3 síðunum bert 3 rimar, ovasta rim, botnrim og ein í miðjuni, og so stikað ímillum (Ku.).

Mynd 5. *a*. Fjórðungsleypur við frammsíðuni tættari; sami sum á mynd 2a. — *b*. Tættleypur úr Tórshavn; sami sum á mynd 2b.

Á línuleypi ganga rimarnar við oyra ígjøgnum stuðlar eins og á vanligum leypi, men teir eru gjørdir eitt sindur ymissir.

Rimarnar: 1) 2 rimar, ovasta rim og botnrim og stimað ímillum við snøri. 2) Ovasta rim, ein afturat í erva og botnrim. Stimað ímillum næstovastu rim og botnrimina, ella heilt smalar, 3—4 cm breiðar, rimar ímillum (Ki).

Botnurin: 1) Sum á vanligum leypi við botnshøkum. 2) Botnurin negldur upp undir botnrimarnar. 3) Botnurin stimaður.

Tættleypurin (mynd 2 b og 5 b). Síðufjalirnar standa við oyra ígjøgnum stuðlarnar. Talið á teimum er ymist, eftir tilfari; tær ganga ígjøgnum í erva og neðra, ofta eisini á miðjuni; ímillum oyruni standa tær í plógv. Botnurin sum á rimaðum leypi, oftast liggur hann oman á botnshøkunum og endarnir á botnfjølunum ímóti botnshakarimunum.

Grótleypur. Mynd 6 vísir grótleyp, sum er gjørdur eftir somu grundreglum sum vanligi rimaleypurin. Tveir stuðlar, og harímillum rimar við oyrum ígjøgnum stuðlarnar, hetta er framsíðan. Síðan eru frá stuðlunum botnshakar, sum botnfjalirnar ganga ígjøgnum. Endiliga eru sniðbond, sum halda botninum uppi; í erva er sniðbandið tappað inn í stuðulin, í neðra botnshakin inn í sniðbandið. Mynd 7 vísir grótleyp úr klótu, t. e. síðustykkini eru klóta, og har ímillum eru rimarnar, sum við oyra ganga ígjøgnum klótustykkini. Botnurin er breið og tjúkk botnfjøl á miðjuni, sett í plógv í síðustykkini, og so er onnur botnfjøl, sum liggur niðurá, og er feld hálv niður í klótuna.

Kilpaleypur er lítil leypur við høddu eins og kilpabytta. Hann er til at bera í hondini. Lítil leypur. (Ku.).

Lokaleypur er, sum navnið sigur, leypur við loki. Sjálvur leypurin er gjørdur annaðhvørt: 1) sum vanligur tættleypur, ella 2) við ongum stuðlum og síðunum sýldum saman í hornunum (mynd 8 a og á).

Síðurnar á lokinum ganga beint upp og eru sýldar í

Mynd 6. Grótleypur við sniðbandi; úr Tórshavn.

hornunum; fjalirnar omaná eru negldar niður á síðufjalirnar. Lokið er kúput omaná, ella er á summum leypum pílt, at vatnið skal renna av. Ofta var rúm undir lokinum at lata upp niðureftir.

Lokið gekk á hongslum og hevði oftast lás, heingilás. Á liðum leypsins vóru húnar at binda fetilin í, ella jarn-

henkur (mynd 8). Innanvert í kjaftinum og lítlan cm upp um tromina vóru negld smøl trø, sum saman við yvirsíðuni á ovastu «rim» gjørdu eina felling, sum lokið fell í; tí tað ráddi um, at vatn ikki slapp inn.

Høvuðsmátini á prestleypinum í Sandagerði (mynd 8):

1) Hæddin á sjálvum leypinum, uttan ..... 56,0 cm
2) Hæddin á lokinum, uttan ..... 9,0 cm
3) Breiddin til síðurnar, uttan ..... 44,0 cm
4) Breiddin aftur og fram, uttan ..... 31,5 cm
5) Tjúktin á tilfarinum:
   Síðurnar á sjálvum leypinum ..... 1,4 cm
   Síðurnar á lokinum ..... 1,1 cm

Hetta er einasti lokaleypur, høvundurin hevur havt høvi til at mála upp.

Landleypur er høgur nakað sum vanligur leypur, men smalur. Hann er ikki smíðaður sum leypur, men negldur saman av fýra borðum, sum eru o. u. 9 tummar breið, $^3/_4$—$^1/_2$ tumma tjúkk og long sum hædd leypsins. Botnurin og lokið eru laggað í, lokið o. u. 2 tummar niðan fyri tromina, og hol mitt í tí við tøppi í. Á summum er lokið til at taka av, hann kann tá eisini verða nýttur til slógv (G). — «Landleypur er tættur og tætt lok í erva, sum ikki skal leka, langur og smalur.» (Gj.).

Fetilin. Leypurin verður borin á bakinum í fetli um ennið (mynd 8 b). Fetilin er evnaður úr ymissum tilfari: hosuleggaldi, einum hvørjum bundnum ella vovnum klæði, ella í nýggjari tíð úr posalørifti ella segldúki. Bandið hevur verið ullband, seinni snøri ella tílíkt. Tað eru nógvir ymiskir mátar at festa bandið uppá í fetilin og í leypin. Á mynd 8 b er bandið drigið í gjøgnum æs í fetlinum og bregdað um. Í leypin er tað fest um stuðulin undir ovastu rim við lykkjuknúti inni í leypinum. Aðra festing í leypin síggja vit á mynd 8 d; har er bandið smoygt inn ímillum ovastu- og næstovastu rim og niður yvir stuðulin. — Fetilin verður bundin í leypin hóskandi til longdar. Er hann

Mynd 7. Grótleypur úr klótu; úr Húsavík.

ov stuttur, verður givið út av bandinum (mynd 8b), ella eitt kast tikið av stuðlinum (mynd 8d), og mótsett um hann er ov langur.

Annars verður fetilin meira umrøddur í næstu grein um leypin í komandi Fróðskapariti.

LEYPANØVN

Her eru nevnd nøvnini á teim ymissu leypunum. Leyparnir eru nevndir eftir eginleikum sínum og øðrum umstøðum: 1) eftir nýtslu leypanna, sum er størsti bólkurin, 38 nøvn, 2) eftir stødd, 18 nøvn, 3) eftir gerð og sniði, 7 nøvn og 4) eftir líkskapi við aðrar lutir, 3 nøvn.

Summir leypar bera fleiri nøvn, eftir tí teir verða nýttir til, sí t.d. byrðarleypur. Og tað ber til at hugsa sær enn fleiri nøvn eftir nýtslu leypsins, tí hann hevur verið nýttur til alt handa slag. Men viðvíkjandi nøvnunum, her eru nevnd, er at viðmerkja, at tey eru givin høvundinum (annaðhvørt sum svar uppá spurnarbløð, ella á annan hátt) sum nøvn á leypum. Eitt undantak er tó, tað er eggjakoppur, hetta orðið verður meira nýtt sum tiltak um leyp, enn sum leypanavn. Tó sigst tað at vera leypanavn suðuri í Dali.

Flestu nøvnini eru samansett við leypi sum seinna liði. Við hesar samansetingar eru ikki viðmerkt kyn og bending, tað er bert gjørt undir orðinum leypur ósamansettum.

Við samansetingum av fimtingi, kannubæra, skeppu og tunnu, eru hesi orð høvuðsuppslagsorð.

Byrðarleypur. «En firkantet kurv af fyrretræ, som man alene bruger at bære noget på ryggen udi» (L.F.) – Hetta er vanligasti leypurin, navnið sigur tað eisini: leypur at bera byrði í. Verður ofta nevndur mótsettur tøðleypi sum øðrum høvuðsleypi. Men hesin leypur hevur mong onnur nøvn, eftir tí hann verður nýttur til; so sigur ein frásøgumaður (svar upp á spurnarblað): « . . . leypanøvn, . . . tey eru mong eftir tí, leyparnir verða nýttir til, t. d. fiska-, tara-, epla-, seiða-, grinda- og útróðrarleypur o. s. fr.; men alt vóru somu byrðarleyparnir.» (Mv.).

Doktaraleypur. Lokaleypur, sum doktari hevði viðføri í, tá ið hann ferðaðist.

Mynd 8. *a*. Lokaleypur, prestleypurin í Sandagerði, Tórshavn. *á*. Sýling. *b*. Fetil, og bandið bundið um stuðulin. *d*. Fetlabandið smoygt niður yvir stuðulin (Hú., Da.).

Dyrgingarleypur. Varð brúktur við dyrging. Lítil, tók góða skeppu el. hálva aðru; – tók einar 50–100 summarseiðir. Rimaður, men so smalt ímillum rima, at hann helt summarseiði. (Skv.).

Eggjakoppaleypur. Tað sama sum eggjakoppur. Tók eini 20 høsnaregg, – kundi eisini vera minni, taka eini 10 høsnaregg (Da.).

Eggjakoppur. Hetta er, í flestum støðum, ikki navn á leypi, men ofta nýtt sum tiltak um lítlan leyp, t. d.: «Hatta

er ikki frægari enn ein eggjakoppur», el. tá ið vaksin maður fór við barnaleypi á baki: «Hvar fert tú við hasum eggjakoppinum». Tó er hetta leypanavn í Dali. (Sí eggjakoppaleypur).

Eggjaleypur. Leypur at koyra eggini í, tá ið teir drógu lunda. Var rimaður, uttan framsíðan var tøtt (G); var lítil tættleypur (He.).

Eplaleypur. Leypur til epli. Sí byrðarl.

Eyrleypur. Leypur at bera eyr í; gjørdur sum vanl. tættleypur, el. viðhvørt síðurnar negldar upp á stuðlarnar (G.).

Ferðarleypur. Lokaleypur at hava viðføri í: klæðir o.a. tá ið tey ferðaðust.

Fimtingur m. (s; ar). Eitt mál, teir máldu korn við; bert kent í Suðuroy. (Sí um fimting bls. 34 niðri á breddanum). Fimfimtingsleypur – minni enn byrðarl. (Svk., Ho.). Seksfimtingsleypur – sum byrðarleypur á stødd (Svk., Ho.). Sjeyfimtingsleypur – stórur byrðarl. (Svk., Ho.). Trífimtingsleypur – lítil leypur (Svk., Ho.).

Fiskaleypur. Leypur til fisk. (Sí byrðarl.).

Fjórðungsleypur. Navnið er eftir stødd leypsins, tekur 1/4 tunnu. – «Fjórðungsleypur varð serliga nýttur sum seiðaleypur, og eisini til korn. Hann var so tættur, at korn fór ikki út úr, ...» (Gj.). (Sí tunna).

Garnaleypur. Leypur at bera fiskaslógv í. Tættleypur, høgur sum vanl. leypur, flatur, t.e. breiðari til síðurnar enn aftur og fram (N.).

Grindaleypur. Leypur at bera grind í. Sí byrðarl.

Grótleypur. Leypur at bera grót á. Eisini nýttur til annað, sum ikki bar til at bera í vanligum leypi. Grótleyparnir høvdu ymist snið (mynd 6 og 7). Sí krókur og ryggbøra.

Hálvfjórðungsleypur. Heilt lítil leypur, tekur 1/2-fjórðungstunnu ella eina skeppu. (Sí tunna!).

Handilsleypur. Lokaleypur at hava til handils at keypa uppí. Á Viðareiði var ein handilsleypur, hann hevði ikki lok.

Hoyleypur. Leypur at bera í hoyggj inn fyri kúnna.

Kannubæri. m. (a; ar). 1 kannubæri = 1/48 tunna. Leypanøvn í samanseting við kannubæra:

Átjankannubæra-leypur (Hó., Da., Gj., Ho., Sd., Mv., Sa.).

Sekskannubæra-leypur (T., Mv.).

Sekstankannubæra-leypur (Gj.).

Tjúgukannubæra-leypur (Mv.).

Tólvkannubæra-leypur (T.).

Tveyogtjúgukannubæra-leypur. (Mv.).

Karðingarleypur. Navn á einum leypi í Húsavík. Húsavíkingur var trúlovaður við gentu har í bygdini. Hann gjørdi sær lítlan, tættan leyp at hava við sær at karða uppí, tá ið hann gekk til gentuna at fríggja. Leypurin varð kallaður karðingarleypurin og er til enn, avgamal.

Kilpaleypur. Leypur við høddu at bera hann við í hondini (samanber kilpabytta); var ongantíð borin í fetli, tók 6 kannubærar (Ku.).

Krókur. m. (s; ar) = grótleypur.

Landleypur. Leypur at bera land í.

Leypur. m. (s; ar). (L. F.). — Rimaður kassi, gjørdur á serstakan hátt og nýttur til at bera í á bakinum.

Leysaleypur. (L. F.)?

Línukassi. m. (a; ar) = línuleypur.

Línuleypur. Serligur leypur at hava fiskilínuna í. (Sí bls. 48.

Línutrog n. (s; trog) = línuleypur.

Lokaleypur. Leypur við loki, sum gekk á hongslum og oftast hevði lás. Ætlaður til ymist, har av tey ymsu nøvnini á lokaleypi, t. d. doktara-, ferðar- og handilsleypur o. s. fr. — Ljósmamman hevði eisini ofta lokaleyp; men hann hevði ikki navn eftir tí.

Miðlingarleypur. Var á stødd mitt ímillum byrðarleyp og tøðleyp (Kl.).

Millumleypur. « . . . á stødd mitt ímillum byrðarleyp og tøðleyp» (Ki.).

Mjølleypur. «Tættleypur at bera í mjøl av mylluni. Stødd o. u. 8 kannubærar» (E.). «At bera kornið á og mjølið av mylluni. Ikki so heilt lítil, ið hvussu er fjórðungsleypur» (G.).

Nótaleypur. Var størri enn byrðarleypur, 4-rimaður. Brúktur við nótakast sum mál at mála partarnar við, sum hvør skuldi hava (T.). — Eisini kent í Hovi.

Prestleypur. Lokaleypur, ferðarleypur hjá presti. Á summum var rúm í lokinum at lata upp niðureftir, har lá kragin.

Reiðrarleypur. «Kurv, som hænges på heste for at bære byrde. —» (L. F.).

Rimaleypur. Leypur við rimum, mótsett tættleypur.

Rossleypur. Leypur at reiða við (mynd 4b). «Hestekurv, kurv som bæres af heste i kløv til førsel af gødning el. hø» (L. F.).

Ryggbøra f. (u; ur) = grótleypur, mótsett stangarbøra, sum tvey bera ímillum sín (Skv.).

Seiðabergsleypur. Leypur at hava á seiðabergi.

Seiðaleypur. — Í flestum støðum tættleypur; annars lítið glopp í millum rima.

Setingarleypur[1]. Hestmenn skóru torv í Skopun og førdu tað heim í báti. «Teir seinastu leyparnir, ið bornir vóru í bátin, vórðu ikki stoyttir, men lógu klárir at bólta fyri borð, um nakað gjørdist at. Hesir leyparnir vórðu róptir setingarleypar» (Poulsen 1947).

Setingarleypur[2]. Ein pinkalítil leypur, sum summir menn vóru vanir at hava á veltuni at seta burturúr, tá ið teir settu niður epli (Sko., Skv.).

Sílaleypur. Lítil leypur, tók o. u. fjórðing, sum verður nýttur, tá ið menn fara í áir (t. e. fara á vøtnini) at fiska síl (G., Mv.).

Skarðaleypur. Brúktur í gamlari tíð at fara til handils við til Bíggjar. Hvussu hann var, tættur ella rimaður, visti frásøgumaðurin ikki. Skarðaleypur æt hann, av tí at farið var við honum oman um Skarð oman til Bíggjar (G.).

Skeppa f. (u; ur). Leypanøvn í samanseting við skeppu: Fimm-skeppuleypur (Hoy.).
Skeppuleypur. Kendur í fleiri bygdum runt um í Føroyum.

Smíðaleypur. Lokaleypur sum báta- og húsasmiðir høvdu amboðini í, við lási (G., Ei., Kl.); tættleypur men við ongum loki, men slá á síðuni innan at seta høggujørn og sovorðið í (T., Skv.' Da., He.).

Smørleypur. «Smørløb, smørkurv; «ilt er at binda svangan hund við smørleyp»» (L. F.).

Taraleypur. Stórur leypur til at bera í ferskan tara í tarakøstin; vanligur byrðarleypur el. størri (Hú., Hv., N., Mv., Skv.).

Tarvaleypur. Tað var størsti leypur, sum var at fáa, vanliga varð hálvtunnuleypur nýttur til tess. Tann sum hevði tarvin, honum lá ikki á at hava hoyggj til hansara, men hann skuldi ganga í húsini at fáa tað hoyggj, hvør skuldi lata. Teir vissu skuldu lata, hvørjir sín dagin. Hann hevði tí stóran leyp, at honum ikki skuldi nýtast at ganga runt meira enn eina ferð um dagin (Gj.).

Tóleypur el. tólleypur. Hevur fyrr verið brúktur til at spinna burturúr. Var ikki altíð tættleypur, men lættur leypur og ikki stórur (G.). Leypur til at hava ull í, tættur (Mv.); = tættleypur, orðið tættleypur verður ikki vanliga nýtt (Skv.); tóleypur var tað gamla navnið, tættleypur er ikki komið fyrr enn seinni (Da.); báta- og húsasmiðir nýttu tóleyp til amboðini (He., Kv., Skv.). (Sí smíðaleypur).

Torvleypur. Byrðarleypur verður nýttur til torvleyp (He., T.). Eingin serligur leypur, allir leypar kunnu vera torvleypar, eingin serlig stødd, tað velst um, hvat maðurin vil leggja á seg (He., Við.); navnið gongur meira uppá innihaldið, t. e.: torvleypur = leypur av torvi (Mv., Sd.).

Trífjórðungsleypur. Leypur sum tekur $^3/_4$ av tunnu. Varð ofta nýttur til at bera hoyggj í. (Skv.). (Sí tunna!).

Tunna. f. (u; ur). Leypanøvn í samanseting við tunnu:

Hálvtunnuleypur. Sama stødd sum byrðarleypur (Kv.); stórur byrðarleypur (Skv.); «størsti leypur í húsinum» (Gj.). Tunnuleypur. «Eina ferð hoyrdi eg gamlan mann nevna tunnuleyp» (He.); tunnuleypur var í «Tofta-húsi», hevði 5 rimar (Mv.). Sum partur av tunnu eru har afturat nevndir hesir leypar: hálvfjórðungs-, fjórðungs- og trí-fjórðungsleypur (sí hesi orð).

Tvagleypur = landleypur. (Hv., Svk., Ho.).

Tættleypur. Navnið man ikki vera gamalt, og tættur leypur at bera tað í og torv og annað er eisini nakað nýtt. Í mongum støðum hava tey nýtt orðið tóleypur fyri tættan leyp. (Sí tóleypur). Eitt dømi, av fleiri, um hvussu sjaldsamur tættleypur er: «Veit bara um ein tættleyp her í bygdini, og verður hann brúktur til amboð» (Ská.).

Tøðleypur. Er minni enn byrðarleypur, og verður ofta nevndur mótsettur honum. Smáir byrðarleypar verða eisini nýttir til at bera tað í. Fyrr var tøðleypur altíð ótættur og er tað í summum bygdum enn, t. d. í Gásadali. Men í flestu bygdum eru nú bæði ótættir og tættir tøðleypar, og tættleypurin troðkar alt meira hin burtur, so nú verða í mongum bygdum, t. d. í Tórshavn og við Gjógv, tøðini borin bert í tøttum leypi[1]). Tøðleypur við frammsíðuni tættari, men hinum rimaðum er kendur í summum bygdum. Tøðleyparnir í Gásadali hava leysan botn at loypa við, eins og rossleypur. Viðhvørt brúka teir ein rossleyp, men eisini hava teir tílíkar stak leypar til at bera tað í; knarvin er á síðuni á leypinum, so maðurin røkkur at loysa hann og loypa tøðini. Í summum øðrum bygdum (t. d. Ve., Hó., No., Koll.) hevur hesin leypurin verið nýttur og verður fyri ein part nýttur enn at bera tað í.

Ullarleypur. Navnið kent í Skúvoy og á Viðareiði, Dali

[1]) Nú sært tú vanliga tøðleypar, har síðurnar eru krossviður negldur uttan á stuðlarnar. Og mær er sagt, at í Klakksvík og summum øðrum bygdum í Norðuroyum og aðrar staðir bera menn nú tað í sinkleypi.

o. aðr. staðir. «Tveir óføra stórir ullarleypar vóru í Ónagerði til at bera í várullina av rættini» (Við.).

Útróðrarleypur. At bera fiskin í av støðni og til hús. Var langur vegur oman á stød, bóru summir snøri, skrín o.a. oman í leypi; hann varð so annaðhvørt settur á støðni, til teir komu aftur, ella inn í neyst (*Winther* 1875 og *Jakobsen* 1898–1901).

SUMMARY

The article gives an account of the Faroese leypur based upon answers to a questionnaire sent out to 39 people in 35 villages and upon the author's own observations.

The present article falls into two sections. Section 1 deals with the mode of construction, Section 2 is a glossary of names given to the leypur. A concluding installment will contain two further sections, namely Section 3 on the sizes of the leypur and Section 4 on its uses.

The various parts of the leypur are named (Fig. 3a), their shapes and measurements discussed and compared. Tables 1 and 2 show that these have never been hard and fast, but that they have varied according to the purpose they were designed for. It is usual for the measurements, at least in part, to vary from village to village.

Fig. 3 to 8 show different sorts of leypar. Fig. 3a shows the type with 5 spars where the bottom is of similar construction as the spars. In Fig. 3b we see the 4-spar type in which case the bottom rests upon the supporting cross pieces. Fig. 4a shows a 5-spar type where the spars are laid across each other. The type known as rossleypur (leypur borne by horses) appears in Fig. 4b. In Fig. 5a 4-spar type is shown where the bottom rests on the supporting cross pieces. These are nailed to the posts from the inside. Fig. 5b shows the tættleypur (solid leypur). Fig. 6 shows the grótleypur (leypur for stone) with a variety of this made from solid pieces of wood in Fig. 7, and Fig. 8 a and á show the lokaleypur (leypur with á lid). Further types are discussed though not illustrated, e.g. a leypur with a handle for carrying in the hand, a large one designed for hay and another for carrying a fishing line in.

Finely is in Fig. 8 b and d shown the fetil (a haedband for carrying the leypur) and two different methods of fastening it.

Section 2 comprises an alphabetical list of leypur-names. It may be noted that some of these names do not denote leypar only but are loose descriptive epithets, eg. eggjakoppur egg-shell.

BÓKMENTIR

1. *Annandale, Nelson:* The Survival of Primitive Implements, Materials and Methods in the Faroes and South Iceland. Journal of the Anthrop. Institute 1903, p. 257–581.
2. *Bruun, Daniel:* Fra de færøske Bygder. (Tillæg til Forslag og Betænkninger afgivne af den færøske Landbokommission, København 1911, p. 599–600).
3. *Grundtvig, Svend* og *Bloch, Jørgen*: Lexicon Færoense, København 1877–88, handrit á Det kongelige Bibliotek, Keypmannahavn. Stytt her til L. F.
4. *Jakobsen, Jakob:* Færøske folkesagn og æventyr, København 1898–1901, p. 15–16 og 548–57.
5. *Landt, Jørgen:* Forsøg til en Beskrivelse over Færøerne, Kjøbenhavn 1800, p. 298–300.
6. *Lunddahl, J. A.*: Nogle Bemærkninger om de færøiske Landboforhold, Kjøbenhavn 1851, p. 43.
7. *Poulsen, Jóan Chr.:* Hestsøga, Tórshavn 1947, p. 38.
8. *Svabo, Jens Chr.:* Indberetninger indhentede paa en allernaadigst befalet Reise i Færøe i Aarene 1781–82, handrit, p. . . . í avriti á Føroya Landsbókasavni, Tórshavn.
9. *Williamson, Kenneth:* The Atlantic Islands, London 1948, p. 58–59.
10. *Winther, Niels*: Færøernes Oldtidshistorie, Kjøbenhavn 1875, p. 392 og 398.